**From:** Jákup Eyðfinn Kjærbo <jek@fmr.fo>
**Sent:** týsdagur, 30. januar 2024 09:27
**To:** Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
**Subject:** Fwd: LM-055/2023

Úr fíggjarnevndini:

1. Hví er bíðitíðin til MVG afturbering upp í 3 til 4 mðr.

**Svar:** Fíggjarmálaráðið hevur spurt seg fyri hjá TAKS, sum hevur upplýst, at tað er Umhvørvisstovan sum málviðger umsóknir um MVG-afturbering. Tá umsóknin er liðugt viðgjørd av Umhvørvisstovuni, og tað er staðfest, at umsóknin lýkur treytirnar fyri at fáa mvg-afturbering, avgreiðir TAKS afturberingina innanfyri eina viku.

2. Hví er tað sett sum krav, at EL-installatiónin í mesta lagi kann kosta 7.000 kr.

   **Svar:** Fíggjarmálaráðið hevur spurt seg fyri hjá Umhvørvisstovuni, sum hevur upplýst, at upphæddin á 7.000 kr. varð sett, tí at tað var týðiligt, at skipanin við mvg-afturbering bleiv misnýtt, eftirsum rokningarnar fyri el-installationina vóru alt fá 5.000-30.000 kr. Hetta hevði samband við, at el-installatiónin oftani fevndi um alt møguligt annað enn hitapumpuna, alt frá at ítokna upppseting av grønum málara til, at jørð var lagt inn í alt húsið. Umhvørvisstovan upplýsti víðari, at rokningarnar fyri el-innlegging framvegis vísa, at  kr. 7.000 er ein hóskandi upphædd.

3. Hvørjar forðingar kunnu vera hjá smærri vinnurekandi, um vinnugluggin gerst eitt krav.

**Svar:** Fíggjarmálaráðið hevur spurt seg fyri hjá TAKS. TAKS dugir ikki at síggja  forðingar í, at tað gerst eitt krav, at mvg-uppgerðin verður latin inn talgilt um sjálvgreiðslu hjá TAKS. Atgongd til Vinnugluggan  krevur einans, at tann Vinnurekandi hevur atgongd til Samleikan og Vangan, og atgongd til Samleikan og Vangan er harnæst ókeypis.

**Vinarliga/Kind regards,**

**Jákup Eyðfinn Kjærbo**

Løgfrøðiligur ráðgevi / Legal adviser
Office: +298 352020

Mobile: +298 552040

jek@fmr.fo



FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**

Ministry of Finance

Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands

Office: +298 352020 / fmr@fmr.fo / www.fmr.fo